gult cyan magenta svart



StÍF–Tjaldur 28–28 (16–11)

# Tjaldur skelkaði strandingar

**Fullkomuliga óvæntað megnaði Tjaldur at taka stig frá strandingum, sum annars hava havt sera góð úrslit seinastu tíðina. Helst var hetta endaliga farvæl til FM-møguleikan hjá StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup*

Tað var so avgjørt ikki væntandi, at Tjaldur skuldi fara at gera nakað sum helst við StÍF, tá liðini bæði hittust í lokaluppgerðini á Skálafirðinum.

Strandingar hava verið sera væl koyrandi seinastu dystirnar, og tað hevur eisini tókst, at sigurin í steypafinaluni veruliga hevði sett ferð á hjá teimum. Við sannførandi spæli hava teir hesa tíðina ført seg fram sum seriøsir biðlar til gullmerkini, og undir øllum umstøðum hevur alt bent á, at minni enn silvurmerki fór talan ikki at gerast um.

Tjaldur hevur hinvegin ligið í botninum alt kappingarárið, tó at spælið eftir eina sera laka byrjan, hevur gingið framá. Síðani útlendingarnir komut til felagið, hevur sjálvt spælið til tíðir verið á eini heilt góðari leið, og fleiri ferðir hevur verið heilt nær við, at fyrsti sigurin móti onkrum av teimum stóru er komin í land.

## Hálv sensatión

Sum sagt, so lág tað so avgjørt ikki í luftini, at tað skuldi verða móti strandingum, at runavíkingar fóru at gera álvara burtur úr hóttanini, og fyrstu løtuna av dystinum sunnudagin var heldur ikki nógv, sum bendi á, at so skuldi verða.

Fyrstu løtuna gekk so hampuliga javnt á, men um miðjan hálvleikin skrædnaði, og tá farið varð til hálvleiks, høvdu strandingar togað seg fimm mál framum.

Seinna umfarið tóktust strandingar at halda fast í leiðsluni, men brádliga fóru gestirnir at toga. Fýra mál á rað syrgdu fyri, at spenningur kom í, og eftir hetta varð munurin ongan tíð stórur.

Tá fimm minuttir restaðu, hevði Tjaldur enn tá lagt seg tvey mál fram um, men heimaliðað fekk tó svarað aftur. 20 sekund fyri leiklok fingu teir eisini lagt seg á odda enn einaferð, men í seinasta álopinum syrgdu tjaldursmenn fyri, at hálva sensatiónin var veruleiki.

## Væl nøgdir

Tá vit um kvøldið fingu orð á ein av leikarunum hjá Tjaldri, Tummas Magnussen, var hann sjálvandi væl nøgdur um úrslitið, sum teir høvdu fingið móti grannunum.

– Vit fingu eina ringa byrjan, har serliga venjarin hjá teimum (Costin Dumitrescu blðm.) gjørdi nógv um seg, men eftir at vit fóru at mansverja hann, fingu vit nógv betri tak í verjuni, greiðir Tummas frá..

– Vit vórðu tó alla tíðina nøkur mál aftan fyri, og tá vit so byrjaðu seinna hálvleik við at forera teimum eitt býtt mál, var tað líka sum luftin fór úr okkum. Vit vunnu okkum tó spakuliga inn aftur í dystin, og at enda eydnaðist tað okkum eisini at koma framum, tá bert fáir minuttir vóru eftir at leika.

Spurdur, hví teir ikki megnaðu at halda fast um leiðsluna, svarar Tummas, at sum so var eingin einstøk orsøk til hetta.

– Eg veit ikki um tað eru nervar, men vit misnýta møguleikar tvær ferðir á rað, har teir ístaðin skora upp á mótálop, so vit skulu vera fegnir um, at Sverri fekk langað bóltin inn til síðs.

Júst Sverri Justinussen var annars stóri maðurin hjá Tjaldri hendan dagin, og Tummas ásannaði eisini, at hetta hevði verið ein heilt góður dagur hjá liðskiparanum. Hann leggur tó samstundis afturat, at talan kanska ikki var um ein av bestu døgunum hjá Jóhan Danielsen í StÍF málinum. Alt í alt var hann tó væl nøgdur um dystin, tó at talan kanska kundi verið um meira. Millum annað brendu gestirnir trý brotskøst, men avrikið styrkir tó avgjørt um sjálvsálitið hjá runavíkingunum.

– Nú skulu vit spæla móti H71 mikudagin, og sjálvandi eru vónirnar til tann dystin góðar. Tað er so undir øllum umstøðum ein dystur, sum skal vinnast, um vit skulu sleppa úr botninum, segði Tummas Magnussen at enda.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: Costin Dumitrescu 9(3), Alexandur Johansen 5, Artur Johansen 4(1), Kristjan Petursson 3, Marius Joensen 3, Leivur Justinussen 2, Andre Danielsen 2
Tjaldur: Sverri Justinussen 12(1), Svein í Heiðunum 6, Tummas Magnussen 3, Dánjal Kjærbo 3, Dejan Mactic 2, Ragnar Olsen 1, Arnfinn Langgaard 1
Brotskøst: StÍF 6, Tjaldur 4
Útvísingar: StÍF 5, Tjaldur 7
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (Beinleiðis reytt)
Domarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Sverri Justinussen var við 12 málum høvuðsmaðurin aftan fyri óvæntaða javnleikin móti StÍF*

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rapa | VÍF | 129 | (30) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 114 | (23) |
| Regina Radó | VB | 110 | (31) |
| Annika Thomsen | Neistin | 106 | (18) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 98 | (34) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 95 | (27) |
| Andrea Lütz | VB | 87 | (7) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 81 | (38) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 79 | (11) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 78 | |
| Gurið Mortensen | VB | 75 | (5) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 69 | |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 68 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 65 | |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 60 | (6) |

Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 153 | (25) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 123 | (31) |
| Dorica Tomic | KÍF | 105 | (29) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 100 | (12) |
| Ingi Olsen | VÍF | 96 | (26) |
| Artur Johansen | StÍF | 92 | (28) |
| Áki Olsen | VÍF | 85 | (8) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 81 | (23) |
| Sámal Joensen | VÍF | 79 | (5) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 75 | (18) |
| Martin Hummeland | VÍF | 74 | |
| Áki Mørk | Neistin | 65 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 61 | (3) |
| Annfinnur N. Debess | H71 | 61 | (4) |
| Marius Joensen | StÍF | 58 | (1) |

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 485 | 257 | 228 | 20 |
| 2 | VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 448 | 336 | 112 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 438 | 352 | 86 | 16 |
| 4 | Neistin | 4 | 2 - 0 - 2 | 346 | 344 | 2 | 9 |
| 5 | Kyndil | 4 | 1 - 1 - 2 | 374 | 435 | -61 | 8 |
| 6 | Sóljan | 5 | 0 - 0 - 5 | 293 | 460 | -167 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 1 - 3 | 232 | 432 | -200 | 2 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 514 | 381 | 133 | 20 |
| 2 | StÍF | 4 | 3 - 1 - 0 | 469 | 410 | 59 | 15 |
| 3 | Kyndil | 4 | 2 - 1 - 1 | 450 | 402 | 48 | 13 |
| 4 | Neistin | 4 | 2 - 0 - 2 | 384 | 409 | -25 | 10 |
| 5 | KÍF | 5 | 2 - 1 - 2 | 399 | 445 | -46 | 8 |
| 6 | H71 | 5 | 0 - 0 - 5 | 435 | 494 | -59 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 1 - 3 | 372 | 482 | -110 | 4 |

gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Sjálvsvirðing og ikki grenj inn á danir

Hans Jørgensen



**Vit eiga okkara part í vælferðaruppbyggingini í ríkinum, og hann lata vit ikki frá okkum uttan svørðsslag.**

Munurin á okkara politikki og tí hjá "parti" av samgonguni er, at vit vilja skipa sjálvberandi búskap, so hvørt sum samfelagið mennist til tað.

Samfelagið kann bara mennast, um vit trúgva uppá, at tað fólk, sum her býr, veruliga vil menning. Vil fólkið ikki menning, hví skulu vit so trúgva, at tað fer at gera tað undir eini aðrari skipan?

Eg veit væl, at New-zealendskir búskaparfrøðingar, sum í hvussu so er partur av landsstýrinum byggir sína framtíð á, Caragata, og Friedmann, sum Thatcher og Breckman settu sítt stóra álit á, og so allir teir nýliberialistisku teoretikararnir, hava aðra hugsan enn vit. Teir trúgva ikki uppá, at eitt fólk vil frælsi, men at tey bert gjøgnum sjálvsøkni og kapping móti hvørjum øðrum kunnu vinna búskaparliga framgongd og vøkstur.

Ábyrgdin er bert okkara Okkara hugsan er ikki tann sama. Vit eru sannførd um, at tað ber til at byggja eitt samfelag upp í felagsskapi, sjálvsáliti, sjálvsvirðing, solidariteti, umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Vit góðtaka ikki, at tað altíð eru hini og teirra ávirkan á okkum, sum skapar lív okkara. Vit trúgva uppá okkum sjálv sum fólk, sum tjóð. Vit eru ikki bangin fyri at fara í samstarv við onnur, tí vit trúgva uppá, at vit eru búgvin til at standa á egnum beinum og taka tær avgerðir, sum vit halda gagna heildini best.

Vit halda ikki, at tað er neyðugt at kappa øll bond við tað ríkið, sum vit hava verið partur av í 600 ár. Vit halda tað heldur ikki vera skomm at vera partur av tí vælferð, sum er bygd upp í hesum ríki, meðan vit hava verið partur av tí, tvørturímóti.

Vit halda okkum eiga okkara part av tí framburði, sum er farin fram í hesum ríki, og vit ætla ikki at lata henda partin frá okkum. Men vit vilja fegin sjálv gjalda okkara part, og vit vilja sjálv taka avgerð um framtíð okkara, uttan at ábyrgdin fyri hvørjum øðrum í ríkinum skal fara fyri skeyti fyri tað.

Men samstundis er eitt grundsjónarmið javnaðarmanna, at endamálið við stuðli er, at hin einstaki skal gerast førur fyri at tryggja sær eitt gott lív. Og soleiðis eisini við stuðuli millum samfeløg. Veitingar mugu hava til endamáls og verða skipaðar so, at tær stuðla sjálvbjargni.

Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at lutfall verður sett ímillum vøksturin í føroysku tjóðarframleiðsluni og einari minking í ríkisveitingunum.

Eftir hesum leisti kann ríkisstuðulin minkast burtur eftir einum áramáli, uttan at tað fær óhepnar avleiðingar fyri føroyska búskapin og harvið fyri føroysku vælferðina. Hvussu skjótt tað kann gerast, verður treytað av vøkstrinum í føroyska búskapinum. (úr Sjálvstýrislógini)

Frymil okkara um minkingina av ríksstuðlinum gongur í stuttum út uppá, at livistøðið skal vera nøkulunda eins í øllum ríkinum. Um vit hugsa okkum, at vit veruliga fara at verða so rík av oljuinntøkunum, sum onkur vil vera við, so er tað sólaklárt, at ríkisveitingin verður ikki hendavegin, men kanska hinvegin, um vit føroyingar veruliga eru so stórsinnaðir og sjálvbjargnissinnaðir, sum vit áttu at verið.

Eg havi hug at biðja fullveldisfólk royna at finna sjálvsvirðingina. Havið álit á tykkum sjálvum. Talið tykkara sak sum "menn" og latið vera við at grenja inn á Nyrup og aðrar danir. Vilja føroyingar fara burturúr ríkisfelagsskapinum, so fara vit. Eingin dani skal bera okkum til fullveldi. Tá vit ikki kunnu taka fullveldi sjálvir, so eru vit ikki búnir til tað.

Javnaðarflokkurin hevur onga ætlan um at taka fullveldi, men vit vísa framvegis á Sjálvstýrislógina, sum grundarlag til eina veruliga skipaða gongd til sjálvberandi búskap og veruligt frælsi fyri fólk okkara.

Við Sjálvstýrislógini í skildrinum kunnu vit í hesum árinum gera sáttmála, sum avloysir heimastýrislógina - ein sáttmála, ið ikki kann takast aftur, men hevur altjóða viðurkenning sum fullgyldigur sáttmáli millum tvey líkastillað lond.

Hvat fær fullveldisfólk at ganga ímóti hesum?

# Fólkaflokkurin strippar!

Jógvan Óli á Fríðriksmørk

Eftir at tað eydnaðist at fáa Tjóðveldisflokkin at ganga við til at halda fólkaatkvøðu 26. mai, kendi Fólkaflokkurin (Bjarni Djurholm) seg rættuliga væl. Og hóast flestu sjálvstýrissinnaði fólk høvdu blandaðar kenslur um atkvøðuna, so vildu tey kortini ikki leggja seg tvør.

**Høvdateoriir**
Nú byrjar at líkjast_og klappini runga! Tað er sjón fyri søgn, nú prosessin er vend á høvdið —at sjálvt í gaddajørð kann sáð bera ávøkst.

Bjarni Djurholm 6. feb. -2001

At landsstýrið loksins er vorðið samt um at venda sjálvstýristilgongdini á høvdið, eru mong sum frøast um.

Bjarni Djurholm 6. feb. -2001

Tað er eyðsýnt, at nýggja sjálvstýristilgongdin er í fullum samljóði við tilmælið frá undirritaða í august í fjør. Tá vóru tjóðveldismenn ikki sørt firtnir um uppskotið at venda processini á høvdið. Men ofta etur hundur tað hann havnar — sigst.

Bjarni Djurholm 6. feb. -2001

Tí kundi tað verið eitt uppskot, at processin varð vend á høvdið. Raðfylgjan í tilgongdini um fullan suverenitet kann ikki vera avgerandi fyri um málið verður egg ella ungi.

Bjarni Djurholm 6. feb. -2001

Í sambandi við viðgerðina av ólavsøkurøðu løgmans í august í fjør, mælti undirritaði enn einaferð til at venda sjálvstýristilgongdini á høvdið

Bjarni Djurholm 6. feb. -2001

**Striptease**
Um maðurin hevur sligið høvdið í, veit eg ikki men í vikuskiftinum er hann aftur koppaður á høvdið. Nú skulu vit onga fólkaatkvøðu hava, sigur høvdamaðurin, -tí Nyrup sigur, at um vit siga NEI á fólkaatkvøðuni so lima vit okkum inn í ríkið med alla. Tað sigur Nyrup!! Hvat er hetta fyri nakað. Fólkafloksmenn halda fyri eyguni og bakka eftir hæli tá Nyrup hostar. Hetta var annars ikki myndin eg hevði av hesum seigu Fólkafloksmonnunum. Men sjálvsagt tíðin stendur ikki í stað, og sum tit síggja omanfyri, við spillfesku sitatunum eftir Bjarna Djurholm, so strippar Fólkaflokkurin í løtuni alment, meðan hann stendur — á høvdinum fyri Nyrupi.

Dagurin í dag og í morgin eru kanska mest avgerandi dagarnir í allari fullveldisgongdini. Spurningurin er um tað ferð at eydnast Bjarna Djurholm og Óla Breckman at avreiða Fólkaflokkinum og alla fullveldistilgongdina. Teir einastu í kunnu venda hesum, eru aðrir fólkafloksmenn, í og kring Fólkaflokkin. Dagurin í dag og í morgin verða avgerandi fyri, um tað eru sambandsinnaðu buldosarnir Bjarni og Óli, sum seta dagsskránna í hesum, eftir øllum at døma, fyrrverandi sjálvstýrishugaða flokki.

Fólkaflokkurin vildi ikki vita av moderatu "skipaðu loysingini" hjá Tjóðveldisflokkinum. Samgongan samdist tí um fólkafloksfilosofiina —"íslendsku loysnina". So var farið til arbeiðis. Menn fóru mannsterkir til samráðingarborðið hjá Nyrup. Nyrup ripar nevan í borði, hostar & harkar. Fólkafloksmenn halda fyri eyguni, og bakka aftur eftir hæli. Uhaa, Nyrup vildi ikki sum vit.

Umaftur. Nýggja roynd: Nú skuldi gamla sjálvstýrisfilosofiin roynast (høvdateoriin hjá Djurholm). Reim og selar. Í 12 ár!! Aftur mansterkir á vitjan hjá Nyrup. Nyrup ripar nevan í borði, hostar & harkar. Fólkafloksmenn halda fyri eyguni, bakka enn einaferð, aftur aftur eftir hæli. Uhaa, Nyrup vildi ikki sum vit.

**Loyalitetur**
Um tað ikki stendur púra greitt fyri Fólkaflokkinum í dag, at danir ONGANTÍÐ ONGANTÍÐ fara at geva grønt ljós fyri ætlanum sum føroyingar leggja fyri dagin, so skilja teir tað heldur ongantíð. Tað er vónleyst.

Kortini hava sambandssinnaðu buldosarnir í flokkinum trumla ein treytaleysan loyalitet mótvegis Nyrupi ígjøgnum, (vil hann ikki, so bakka vit) sum ongantíð er sæddur í Fólkaflokkinum fyrr.

Fólkaflokkurin torir ikki til fólkaatkvøðu við uppskotinum hjá landstýrinum, tí Nyrup sigur at um vit siga NEI, so hava vit innlimað okkum í ríkið. Uhaa_

**Avreiðing?**
Men so hendir naka. Nú ferð Fólkaflokkurin púra ósmæðin inn á øki hjá landstýrismanninum í fullveldismálum og leggur eitt uppskot fram, sum helst er meira sanlígt kann tulkast sum innliman. Hvussu man Nyrup fara at tulka hetta, ha? Aftur á høvdið kanska?? Sjálvsagt. Hví skal hann ikki tað? Fólkaflokkurin bakkar jú hvørja einastu ferð. Nyrup hevur fingi frítt spæl.

Og so verður alt hetta gjørt meðan Eyðun Viderø, Jógvan á Lakjuni og Jákup Suni Joensen er uttanlanda -skilst. Er tað tilvildarligt,- at mýsnar eru farnar upp á borðið, júst nú? Eru Fólkafloksveljarar greiðir ivir hvat gongur fyri seg í dag.

Góðtaka fólkafloksmenn at tvey sambands element í flokkinum avreiða Fólkaflokkinum og alla fullveldistilgongdini?? Eg spyrji bara.

Lat okkum okkum kortini vóna at Bjarni Djurholm fær rætt: -at sjálvt í gaddajørð kann sáð bera ávøkst.

Ofta etur hundur tað hann havnar!

**Tað ber til**
Eg velji kortini at trúgva, at tað framvegis er ein møguleiki at hittast aftur hjá flokkunum báðum. Men eg eri líka sannførdur um, at hetta krevur ein virknari leiklut frá fólkafloksmonnum á sjálvstýrisvonginum, skal hetta eydnast, -og ikki alt fara fyri bakka -endaliga.